# Alt TIMBURARBEIÐI

## verður gjørt

**Skalt tú byggja, tekja, broyta ella umvæla.**

***Ring og fá eitt tilboð***
***Tlf. 226459 / 226469***

ZARTEC
BYGGING

Sp/f ZARTEC Bygging — Tlf. 226459
V/ Heðin B. Nielsen — Tlf. 421403
Húsasmiður — Fax. 421403

# Skrivstovustarv

Í Landsmiðstøðini er eitt starv sum skriv-stovufólk leyst at seta frá 1. oktober 2008 ella skjótast til ber.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um avgreiðslu av viðskiftafólki, útlán av undirvísingarmiðlum, røkt av bókasøvnum og ymiskt praktiskt arbeiði í sambandi við skeiðsvirksemi. Starvið fevnir eisini um bókhald og avgreiðslu um FSL-skipanina hjá Føroya Gjaldstovu.

Vit sóknast eftir fólki, sum hevur
- skrivstovuútbúgving/royndir við skrivstovuarbeiði
- viðkomandi arbeiðsroyndir, eitt nú frá bókasavni og/ella við bókhaldi
- førleika og áhuga í at nýta teldu í arbeiðinum
- kunnleika til Aleph ella aðra líknandi bókasavnsskipan.

Lýkur tú øll ella flestu førleikakrøvini omanfyri, dámar tær at abeiða sjálvstøðugt, ert tú røkin og tænastuhugað/-ur, hevur tú góð samstarvsevni og hevur tú lætt við at samskifta við fólk, er tað helst teg okkum tørvar.

Vit kunnu bjóða eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv í einum stovni, sum hevur samskifti við flestu skúlar og lærarar í landinum, og sum hevur samstarv við eitt nú Mentamálaráðið, Landsbókasavnið og Føroya Gjaldstovu.

Talan er um starv í fulla tíð. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petur Simonsen, stjóra í Landsmiðstøðini, tlf. 356850 ella 220414.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir v.m. skulu vera Landsmiðstøðini í hendi í seinasta lagi mikudagin 17. september 2008.

**Landsmiðstøðin**
Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3084
FO-110 Tórshavn
www.lms.fo • lms@lms.fo

www.lms.fo — Landsmiðstøðin

Landsmiðstøðin er stovnur undir Mentamálaráðnum, sum veitir tænastur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, veitir fakliga og námsliga ráðgeving, skipar fyri eftirútbúgving av lærarum og hevur námsligan verkstað.

# SUDOKU

Sosialurin

Hvønn dag í august mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mánadagin 8. september 2008 kl. 10.00 og merkið brævbjálvan »Sudoku«.

Drigið verður aðru vikuna í september.

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

Navn:____________________
Bústaður:____________________
Telefon:____________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

## Vinningurin í august

In•tone clinic letur vinningin í august, sum er eitt gávubræv á 12 viðgerðir, virði kr. 4.200,-.

## AUGUST-KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | 8 | | | | 3 | 5 |
| | | | 2 | | 3 | 4 | | |
| | | 3 | | 4 | | 7 | | |
| | | | | | | 3 | 7 | 1 |
| | 5 | | | | | | 8 | |
| 2 | 8 | 1 | | | | | | |
| | | 5 | | 7 | | 1 | | |
| | | 4 | 9 | | 5 | | | |
| 7 | 6 | | | | 1 | | | |

**Vinnari av Juli-kappingini:**
Sylvia E. Guttesen
Spógvavegur, Tórshavn

## Mánaðarkort-tilboð

Kom til viðgerð so ofta tú hevur hug í ein heilan mánað.
Mánaðarkort bert kr. 3.990,-

Tilboðið er bert galdandi til 1. sept. 2008

- Klænkar
- Minkar um appelsinhúð
- Strammar kroppin upp
- Tekur burtur strekkimerki
- Gevur fastari húð
- Kokubotnavenjingar
- Vøddamýking
- Fitibrenning
- Útreinsar avfallsevni
- Styrkivenjing
- Yngir
- Andlitslyft
- Minkar um rukkur
- Tekur burtur fínar linjur
- Betrar um aknehúð
- Gevur bringulyft
- Antistress viðgerð
- Zoneterapi
- Kostvegleiðing



Stramma kropp og andlit uttan skurðviðgerð

**Opið er soleiðis:**
Mánadag, týsdag og hósdag......10.00-18.00
Mikudag og fríggjadag ..............11.00-18.00

in•tone clinic
J. Paturssonargøta 18 · Tórshavn · Tel 322045